# TB og AB liggja framvið

**Uttan nakran upplagdan størfavoritt tykjast TB og AB vera bestu boðini uppá gullkrónurnar og harvið uppflyting í 1. deild í ár, men fleiri lið hava styrkina at hótta favorittarnar**

**Heini í Skorini**
heini@sosialurin.fo



B71 er outsidari til uppflytingarplássini í 2. deild

Mynd: Álvur Haraldsen

Kappingarárið 2004 í 2. deild hjá monnum kann gerast eitt spennandi og javnt ár við harðari kapping um fyrsta plássið, tí einki upplagt lið kann undan kappingini bera heitið sum størfavorittur. Niðurflytararnir úr FS Vágum hava mist um tíggju leikarar í vetur, og tískil spáa vit, at TB og AB koma at kappast um oddasessin, meðan B36, FS Vágar, Sumba og B71 fara at stríðast um, hvør kann hótta oddaliðini. LÍF, KÍ, Royn og VB verða sostatt at síggja í tyngra endanum.

## Missurin í Vágum ov stórur

Niðurflytarin úr 1. deild í fjør, FS Vágar, tykist hava verið fyri ov stórari frágongd í hópinum til aftur í ár at kunna rópa seg favorit í 2. deild. Í fyrraárið varð felagið úr Vágunum nógv besta liðið, men við niðurflytingini í fjør og eini frágongd, sum væntandi setir síni spor, fær FS Vágar torført við at endurtaka uppflytingina frá 2002. Nýggjur brasilíumaður við navninum Wellington er tó komin til felagið, og Sonni Johansen er afturkomin úr B36.

Men listin er størri við rýmdum leikarum. Jens Erik Rasmussen, Johannes Joensen, Vlad Osipovs, Ruslan Screlea, Jóhannes Olsen, Bjarni Prior, Ari Thomassen, Rói Árting og Clayton Soares eru millum profilarnar, sum ikki verða at síggja á FS Vágar liðnum í ár, og við stóra missinum kunnu vágamenn tí vænta sær eitt torført kappingarár í stríðnum um uppflyting, har nýggir og ungir leikarar skulu taka við. Tó er felagið at rokna millum liðini, sum kunnu gera seg galdandi í oddinum, tí talan er hóast alt um FS Vágar, sum vanliga ikki ger leingi av í 2. deild eftir mongu niðurflytingarnar úr fína selskapinum. Nýggi venjarin Jógvan Norðbúð fær sostatt til uppgávu at halda uppflytingartraditiónina við líka, hóast hann má arbeiða við einum skerdum og ungum FS Vágar liði.

## Dreymurin á Argjum

Síðani AB í 2002 flutti upp í 2. deild og í fjør høvdu ambitiónir og leikaratilfeingi at luttaka í oddastríðnum, hevur felagið nú megnað at savna ein hóp, sum veruliga kveikir dreymar á Argjum um uppflyting og luttøku millum tey bestu í lovaða landinum.

AB megnaði í fjør ikki at halda tørn í oddinum, tá kappingin fór at halla, men við somu grundstamminum frá í fjør umframt tilgongd úr HB, TB, NSÍ og B36 verður AB avgjørt eitt spennandi lið at fylgja í ár. Bjarni Jørgensen, Rani D. Christiansen, Jón Clementsen, Toni Rasmussen, Andrass Nolsøe, Djóni N. Joensen og Jón Brekku eru millum nýggju leikararnir í AB, meðan Bogi Johannesen og Bogi Midjord eru farnir. Kári Reynheim, sum hevur skift fótbóltstilveruna í Fram út við hana á Argjum, er avloysari hjá Sámal Erik Hentze í venjarasessinum, og hetjan úr Belfast á sinni tykist hava góðar fortreytir at gerast fyrsti venjarin nakrantíð, sum førir AB til 1. deildarfótbólt komandi kappingarár.

## Ghanesar skulu lyfta TB

Við afrikanskum rytmum á Sevmýri skal TB í ár realisera ambitiónirnar um uppflyting. Í roynd-unum at røkka málinum hevur felagið fingið samband við tveir leikarar úr einum so fjarskotnum landi sum Ghana, og í skrivandi stund eru leikararnir á veg til føroyska kuldan. Umframt hetta hava teir eisini tryggjað sær sterka eystureuropeiska verjuleikaran úr Vági, Predrag Zivkovic. Samstundis er landsliðsliðskiparin Óli Johannesen enn í felagnum, meðan Rasmus Nolsøe og Andrass Nolsøe eru farnir til ávikavist HB og AB at royna eydnuna.

Saman við AB tykjast tvøramenn verða favorittar at vinna deildina, og hevur felagið so at siga hvørt ár í 2. deild heitið sum ein av kandidatunum til uppflyting. Í fjør endaði TB á øðrum plássi, men møguleikin glapp í tveimum play-off dystum móti Skála, har tvørámenn nærmast vórðu eyðmýktir.

## Breiður B36 hópur

Sum flestum kunnugt hevur einki felag verið so virkið á marknaðinum sum havnarfelagið B36. Við einum ovurstórum og breiðum 1. deildarhópi kemur hetta sjálvsagt at merkjast í 2. deild, tí tað er jú bert pláss fyri 15 leikarum á 1. liðshópinum hvønn sunnudag.

Tískil mugu fleiri B36 leikarar við 1. deildarroyndum og 1. deildar ambitiónum helst taka til takk-ar við einum plássi á 2. liði, og við hesum útgangsstøðinum tykist B36 hava leikaratilfeingi til eitt sterkt 2. lið, um leikarar í periferiini í 1. liðshópinum verða verandi í felagnum. Sjúrður Norðbúð venjari kann sostatt vænta sær dyggan styrk úr breiða 1. liðshópinum hvønn leygardag, og verður spennandi at síggja, um havnarfelagið kann hótta tey stóru, hóast 2. lið hjá B36 má spæla uttan stóra motivatiónsfaktorin, sum strembanin eftir uppflyting er.

## Sumba og B71 outsidarar

Saman við B36 eru Sumba og B71 outsidarar í oddastríðnum. Eftir eitt heldur vánaligt kappingarár í fjør hevur B71 í steðginum fingið styrk úr Vágunum, har brasilíumaðurin Clayton Soares er nýggjur í álopinum, og í skrivandi stund verður bíðað eftir innfararloyvi til fyrrverandi FS Vágar leikaran Ruslan Screlea og Arunas, sum spældi við B71 fyri tveimum árum síðani. Liðið av Sandoy er tó sera ungt og tykist als ikki hava somu leikarastyrkina sum favorittarnir av Argjum og Tvøroyri.

Sumba hevur ein hóp við royndum úr 1. deild, men seinastu árini hava verið vónbrot fyri sumbingar, sum ikki hava megnað at veruliga at hótt oddaliðini, hóast teir í fjør fingu bronsuna. Viðvíkjandi leikaratilfeingi røkist einki fyri, at árið í ár skal vera øðrvísi fyri Sumba, sum ongan nýggjan leikara hevur fingið, meðan tann eini av trimum póllendingum, Robert Lucak, er farin av landinum. Hóast hetta er Sumba til at rokna millum liðini, sum kunnu koma at standa fyri óvæntaðum avrikum.

## Hini

Hini liðini eru KÍ, VB, LÍF og Royn, sum væntandi vera at síggja í tyngra endanum. Uppflytararnir úr Royn fáa tað strevið, meðan LÍF, KÍ og VB hava fingið tó vana at liggja miðskeiðis ella í niðara endanum á stigatalvuni í 2. deild. Av hesum fýra liðunum kunnu bert LÍF og Royn flyta upp, og roknast skal ikki við nøkrum uppflytara millum tey bæði.

Men sum kendi ítróttarjournalisturin á Tibslaðnum, Jens Jørgen Brinch, plagdi at taka til, so eru mangir ítróttarskribentar og sokallaðir "serfrøðingar" gjørdir til skammar við at tippa og spáa um eitt kappingarár, sum ikki er farið í gongd. Vit tosa jú um eitt óforútsigiligt spæl, har alt kann henda…






